Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 4. november 2025
Mál nr.: 25/12862-11
Málsviðgjørt: BÁT

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014, løgtingslóg nr. 62 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 70 frá 25. mai 2020 og § 9 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 10. Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at hann kann búgva í egnum heimi sum longst.	**1.** § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti og borgara við demenssjúku tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at viðkomandi kann búgva í egnum heimi sum longst."
§ 10 a. Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing.	**2.** § 10 a, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist og

Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin: 1) kann búgva heima sum longst og 2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.	borgara við demenssjúku, ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at viðkomandi: 1) kann búgva heima sum longst, og 2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.”
§ 10 b. Kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna ellisbrek ella sjúku hevur týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.	**3.** § 10 b, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna ellisbrek ella sjúku hevur týðandi ella varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin viðkomandi er, og til borgara við demenssjúku.”
§ 10 b. ... *Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar, soleiðis at fólkapensjónisturin: 1) kann búgva heima sum longst, og 2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.	**4.** § 10 b, stk. 2 verður orðað soleiðis: “*Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar, soleiðis at borgarin: 1) kann búgva heima sum longst, og 2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.”
§ 13. Kommunurnar kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar.	**5.** § 13, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Kommunurnar kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar og borgarar við demenssjúku.”
§ 14. Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.	**6.** § 14, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku og borgarum við demenssjúku, sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.”
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.